# Barnakonsert fyri allar aldrar

**Forkunnugir gestir vitja eina forkunnuga konsert í bygdarhúsinum**

BARNATILTAK
*Snorri Brend*

**Hósvík:** Tað er ikki á hvørjum degi at fólk sleppa til barnakonsertir í bygdarhúsinum í Hósvík.

Men hetta forkunnuga høvið fáa tey nú møguleika til komandi sunnudag, tá eitt stórt tiltak í so máta verður við luttøku av børnum og ungdómi úr bygdini.

Á skránni er nógvur sangur og felagssangur, undir leiðslu av einum tónleikabólki sum hevur tað sjáldsama heitið "Baby Boon Band".

Skráin fyri tiltakið er, at byrjað verður við teimum ungu, sum fara at syngja ein sang undir leiðslu av Árna av Reyni. Síðani syngur barnakórið fýra sangir undir leiðslu av sama leiðara.

Síðani koma tey smáu framat við eini framførslu, har áðurnevndi tónleikabólkur spælir undir. Teir spæla eisini undir til tað, sum eftir er av skránni, tá fyrst barnakórið og síðani tey ungu koma aftur á pallin, áðrenn alt tiltakið endar við tí kenda slagaranum "Eg eiti Jógvan".

Hetta er so tann lokali parturin av skránni, men hósvíkingar fáa í hesum samband enn eina forkunnuga vitjan, tá væl umtókti sangfuglurin Brandur Enni fer at syngja nakrar sangir.

Konsertin byrjar kl. 16 og eftir skránni verður hon liðug kl. 17:30.



*Børnini kunnu gleða seg til serstaka vitjan aftur í ár, tá barnakonsertin verður í bygdarhúsinum sunnudagn*


## Sundalagsstevna 2005 í Hósvík

**Hósdagin 16. juni**

| | |
|---|---|
| 19.00 | Stevnubingo í bygdarhúsinum |

**Fríggjadagin 17. juni**

| | |
|---|---|
| 19.00 | Grand Prix súkklukapping |
| 19.00 | Rennikapping í bygdini fyri børn og vaksin. Uppmøting í róðrarneystinum |
| 20.00-24.00 | Tivoli í bygdarhúsinum |
| 20.00-04.00 | Kiosk, pylsuvognur og matsøla í bygdarhúsinum |
| 23.30-04.00 | Dansur í bygdarhúsinum har Showmenn spæla. |

**Leygardagin 18. juni**

| | |
|---|---|
| 14.00 | Stevnan verður sett niðri á bryggjuni. Heðin Zachariassen setur stevnuna og GHM spælir |
| 15.00 | FM kappróðrur. Eftir róðurin handar Dánjal Petur Olsen steypini |
| 15.00-20.00 | Framsýning í skúlanum. Myndlist við lokalum listafólki |
| 15.00-04.00 | Kiosk, pylsuvognur og matsøla í bygdarhúsinum |
| 15.00-24.00 | Tivoli í bygdarhúsinum |
| 15.00-24.00 | Hoppiborg, sjórænaraskip, sumoglíming, rusjibani o.a.m. í skúlagarðinum |
| 18.00 | Steypadystur ímillum EB/Streym og NSÍ á Mølini á Eiði |
| 20.00 | Útimøti niðanfyri bygdarhúsið |
| 23.30-04.00 | Dansur í bygdarhúsinum har "Eager To Please" spæla |
| 24.00 | Midnáttarrøða og felagssangur niðanfyri bygdarhúsið. Heidi Petersen løgtingskvinna heldur røðu og Sundakórið syngur |

**Sunnudagin 19. juni**

| | |
|---|---|
| 11.00 | Guðstænasta í Hósvíkar kirkju, Torkil Beder prædikar |
| 15.00-20.00 | Framsýning í skúlanum. Myndlist við lokalum listafólki |
| 15.00 | Kappsigling |
| 16.00-22.00 | Hoppiborg, sjórænaraskip, sumoglíming, rusjibani o.a.m. í skúlagarðinum |
| 16.00-22.00 | Tivoli í bygdarhúsinum |
| 16.00-22.00 | Kiosk, pylsuvognur og matsøla í bygdarhúsinum |
| 16.00-17.30 | Barnakonsert í bygdarhúsinum við millum annað Brandur Enni, barna- og ungdómskór og Baby Boom Band |
| 18.00 | Togtogan um Lægá |
| 19.00-22.00 | Barnadiskotek í bygdarhúsinum |

Sosialurin 341800




## Kappast um tøl

**Hósvík:** Hóast flestu tiltøkini á Sundalagsstevnuni verða um sjálvt vikuskifti, so taka hósvíkingar longu hol á skránna í kvøld.

Í kvøld kl. 19 verður nevniliga skipað fyri serstøkum stevnubingo í Bygdarhúsinum.

Á skránni eru nógvir góðir vinningar. Millum hesar góðu vinningar er ein flogferð.

**sb.**

## Kappast í sigling

**Hósvík:** Hóast kappróðurin man vera hann, sum hevur størstan áhuga í sambandi við stevnuna, so verður eisini skipað fyri øðrum kappingum á sjónum um vikuskiftið.

Seinnapartin sunnudagin verður nevniliga skipað fyri kappsigling. Tey, ið hava áhuga at verða við, kunnu melda bátar sínar til hjá Kristiani Hansen og Agnari Olsen í Hósvík.

Kappsiglingin byrjar sunnudagin kl. 15 og verða bátarnir bidnir um at møta ein tíma áðrenn.

**sb.**

## Kappast á súkklu

**Hósvík:** Fríggjakvøldið kl. 19 fara súkklarararnir at royna seg á Sundalagsstevnuni.

Tá fer nevniliga Tórshavnar Súkklufelag at skipa fyri kapping fyri unglingar og vaksin. Vanligt hevur verið við barnasúkkling, men mett verður at trygdin í samband við júst hesa kappingina ikki er nóg góð.

Kappingin byrjar á landsvegnum í Hósvík og verður súkklað eftir landsvegnum til rundkoyringina omanfyri Norðskála og aftur, - íalt einar 22 km.

Heiðurstekin verða latin trimum teimum skjótastu súkklarunum samanlagt, og trimum teimum skjótastu undir 18 ár og trimum teimum bestu yvir 45 ár.

Øll eru vælkomin at verða við. Treytin er at ein hevur eina súkklu sum er í rímiligum standi, og – ikki óvæntað! – ein góðan súkkluhjálm.

**sb.**

## Kappast í skjótleika

Hósvík: Umstøðurnar til ítróttarligt virksemi eru ikki tær størstu í bygdini. Men tað forðar kortini ikki fyrrireikarunum í at skipa fyri eini rennikapping í samband við stevnuna.

Henda rennikappingin verður fríggjakvøldið kl. 19, og er ætlað bæði børnum og vaksnum.

Tey, ið hava hug at verða við, kunnu møta við róðrarneystið.

**sb.**

Lesið Sosialin -so eru tit við!